

*Tað var náttina millum 9. Og 10. November í 1989, at Berlinmúrurin fall. Stutt frammanundan hevði Ungarn latið markið upp til Eysturríki, og harvið vaks kravið frá eysturtýska fólkinum um at sleppa at ferðast frítt til Vesturheimin*

9. november 1989:

# 20 ár síðani múrurin fall

**Í dag eru 20 ár liðin síðani Berlin-múrurin fall. Nú eru bert nøkur fá spor at hóma av tí stóra múrinum, sum deildi týska høvuðsstaðin sundur**

*Heri Simonsen*
*heri@sosialurin.fo*

Eingin sum er yvir 30 ára gamal gloymir dagin fyri 20 árum síðani. Tórshavnar Býráð við Poul Michelsen, borgarstjóra á odda hevði júst fingið felags antennuætlanina »Rás Tórshavn« upp at koyra hetta heystið, og tað var ein góð timing hjá Tórshavnar Býráð. Við BBC World Service í hvørjari stovu í høvuðsstaðarøkinum bar til saman við øllum øðrum europearum at fylgja við tí spennandi gongdini, tá Berlinmúrurin fall hendan minniliga dagin fyri 20 árum síðani.

## Stóð í 28 ár

Múrurin stóð í 28 ár sum ein ónd ímynd av kúging og ófrælsi. Fyrstu tíðina var talan um 12 kilometrar við betongi, og 137 kilometrar við píkatráði. Verkætlanin hjá kommunistisku DDR-stjórnini at gera ein samanhangandi betongmúr byrjaði í 1965.

Tá alt stóð liðugt var talan um 106 kilometrar við 3,5 metra høgum betongmúrum, 67 kilometrar við 3-5 metrar høgum píkatráði. Tað vóru 116 eftirlitstorn og 20 bunkarar, 105 kilometrar við pansaragrøvum. Nógv vaktarfólk og hundar ansaðu eftir, at eingin skuldi flýggja vesturum allan sólarkringin.

Mett verður, at millum 1961 og 1989 flýggjaðu yvir 5.000 fólk vesturum. Umleið 3.200 fólk blivu fangaði av eysturtýsku eftirlitsfólkunum. Stór óvissa valdar um, hvussu nógv blivu skotin í royndunum at flýggja til Vestur-Berlin. Men hildið verður tó, at talan má vera um minsta lagið 1.000 fólk vóru myrd í royndini at flýggja til frælsi. Tað verður kortini mett at vera rættiliga vist, at 136 fólk vóru skotin við múrin.

Talan var í stóran mun um mannfólk, sum vóru millum 16 og 30 ára gamlir. Yvirborgmeistarin í Berlin, Willy Brandt, sum seinni gjørdist týskur samveldiskanslari mótmælti harðliga, at eysturtýsku myndugleikarnir bygdu múrin, men tað rein ikki við kommunistiska einaræðið í DDR.

## Náttina millum 9. og 10.

Berlinmúrurin fall náttina millum hósdagin 9. november og fríggjadagin 10. november í 1989. Ungarn hevði stutt frammanundan latið markið upp til Eysturríki, og nú vaks kravið frá eysturtýska fólkinum um at sleppa at ferðast frítt til Vestur-Týskland. Tann einstaka hendingin, sum gjørdi, at múrurin fall, var ein tíðindafundur hjá tí kommunista stjórnarstýrisliminum, Gunther Schabowski, sum var varpaður beinleiðis í eysturtýskum sjónvarpi. Ímóti endanum av tíðindafundinum las Schabowski upp eina fráboðan frá DDR-stjórnini um eina nýggja reglugerð fyri ferðing hjá DDR-borgarunum. Hetta gjørdi